## Seðlarøðin liðug

**Hósdagin kom nýggjur føroysku 1000 krónu-seðil í umfar. Og við hesum er nýggja røðin av pengaseðlum liðug**

SEÐLAR
*Jákup Mørk*

Tað varð gjørt nógv burturúr, nú nýggja føroyska seðlarøðin er liðgt. Fyrsti seðilin í hesari kom fyri góðum fýra árum síðani, tá sumbingar fingu sína bygd á nýggja 50-krónuseðilin, og síðani eru 100, 200 og 500 krónu-seðlarnir so líðandi lagstir afturat.

Tjóðbankin hevði saman við Landsstýrinum skipað fyri lítlari móttøku, nú seinasti seðilin í røðini varð sendur í umfar.

**Lítil fuglur á stórum seðli**

Torben Nielsen, sum vegna Tjóðbankan hevði orðið á tíðindafundinum, var skjótur at staføesta, at bæði tey og landsstýri hildu seg vera sera væl nøgd um nýggju røðina, sum nú er givin út. Ikki minst tóktist hann sjálvur at halda nógv av akvarellunum hjá Zacharias Heinesen, sum prýða seðlarnar, umframt at seðlarnir við serstøku náttúrumotivum sínum eru nakað øðrvísi - og kanska vakrari - enn pengaseðlar ofta eru.

Á størsta seðilinum í røðini, er tað ein av teimum smærru fuglunum í Føroyum, sum er valdur sum motiv. Ein ungur grágrælingur í vetrarbúna sæst flúgva, og Torben tóktist mest sum vera hugtikin av sterku kontrastunum, sum í myndini. Kontrastir, sum tó eisini eru við til at økja um trygdina á seðlunum, segði hann. Hetta tí ein mynd við nógvum detaljum og mótsetningum er trupul at eftirgera, so eisini á tann hátt tænir myndin einum endamáli.

Aftan fyri flúgvandi grágrælingin er mynd av einum fuglaflokki, og eins og myndin á baksíðuni, so er tað Zacharias, sum hevur gjørt hesa.

Baksíðan er annars ein mynd við útsýni av sandinum á Sandi, og hetta hevur eisini tilknýti til grágrælingin. Stóri sandurin er nevnliga eisini tilhaldsstaður hjá hópi av fuglum - teirra millum grágrælinginum.

# Fer væl nøgdur til handils

**Zacharias Heinesen, sum hevur tekna motivini á nýggju seðlarøðini, heldur seg vera væl nøgdan um endaliga úrslitið**

SEÐLAGERÐ
*Jákup Mørk*



*Nógvir tímar og nógvir tankar liggja aftan fyri nýggju seðlarøðina. Men sjálvur sigur listamaðurin seg vera nøgdan, nú endaliga úrslitið fyriliggur*

Hóast tað kanska tykist sum bara eitt lítið motiv av onkrum slag, so liggur nógv arbeiði handan eina nýggja røð av pengaseðlum. Endaliga úrslitið skal jú helst standa eftir í hampuliga nógv ár, og tí er eisini umráðandi, at lidna vøran er bæði snøgg og haldgóð.

Snøgga partinum hevur Zacharias Heinesen staðið fyri. Umframt motiv av fuglum, fiskum og øðrum, so eru føroysku seðlarnir eisini prýddir við akvarellum hjá føroyska listamanninum. Akvarellir, sum í dag eru ogn hjá Tjóðbankanum, saman við einum rúgva av kladdum, sum Zacharias sjálvur tekur til.

**Marknaðarføra Føroyar**

Á tíðindafundinum hósmorgunin fekk Zacharias eisini stórt rós fyri tað arbeiði, sum hann hevði gjørt í hesum. Og sjálvur tóktist listamaðurin vera sera fegin um vøkru orðini, sum vórðu søgd. Ikki minst tí hann heldur seg hava lagt eitt stórt arbeiði í hetta.

Sjálvur heldur Zacharias, at tað hevur tikið á leið ein mánaða at gera endaligu tekningarnar til hvønn seðilin. Og áðrenn tað yvir høvur kom so langt, skuldi jú eisini gerast av, hvørji motiv skuldu veljast.

- Áðrenn vit byrjaðu, tosaðu vit nógv um, hvat vit ynsktu at fáa fram í seðlarøðini. At byrja við tosaðu vit um at fáa kendar føroyingar avmyndaðar. Partvíst hildu vit tó, at tað kundi gerast ein trupulleiki at finna júst teir røttu persónarnar til hetta, og partvíst hevði hetta kanska eisini verið ov líkt tí, sum vit síggja pengaseðlum aðra staðni í heiminum.

- Tað endaði so við, at vit fluttu okkum yvir á landslagið. Bæði tí vit her finna nógv áhugaverd motiv. Og ikki minst, tí vit við hesum vóna, at hetta kann vera eitt slag av marknaðarføring av Føroyum.

*Men hvussu hevur tú so valt ymsu motivini. Var tað nakað, sum tú gjørdi av alt fyri eitt, áðrenn tit byrjaðu upp á røðina?*

- Nei, als ikki. Eg havi tvørtur ímóti ferðast nógv kring landið í royndunum at finna júst røttu myndirnar. Tær skulu helst eisini hóska saman við restini av tí, sum er á seðlinum. Eitt nú er mynd av Klaksvík á hundraðkrónu-seðlinum, har ein toskur eisini er á. Og soleiðis hava vit roynt at havt ein samanhang í, sigur hann.

**Keypir við góðari samvitsku**

Og nú endaliga úrslitið er liðugt, tykist Zacharias at vera væl nøgdur. Í øllum førum helt hann, at hann ikki fór at hava ringa samvitsku, tá hann í framtíðini skal rinda við einum seðli av onkrum slag, tá hann fer til handils

- Jú, eg hað haldi meg vera nøgdan. Eg havi fingið nógv vøkur orð um hetta arbeiði, og tað eri eg fegin um. Og eisini haldi eg tað riggar væl, at vit mest sum alt fyri eitt gjørdu av, at tað skuldi ikki vera ov nógv órógv í myndini við rammum og øðrum dekoratiónum. Tað ger eisini, at myndin traðkar betri fram, haldi eg, segði lítillætni - men kortini fegni - listamaðurin at enda.

### TRYGDIN ER Í LAGI

Nýggi 1.000 krónu-seðilin inniheldur eins og hinir seðlarnir í røðini hópin av trygdarátøkum. Á tíðindafuninum hósdagin helt Torben Nielsen fyri, at alt, sum er gjørt av manni, eisini kann eftirgerast, men hann vónaði í øllum førum, at trygdarátøkini gera eina møguliga eftirgerð munandi truplari.

Í stuttum kann sigast, at tú bæði kanst kenna og merkja eftir, at seðilin er ektaður. Hetta eftir fylgjandi kriterium:

- Vatnmynd er í seðlinum, sum avmyndar veðrin og føroyska krossin.
- Ein heilmynd (hologram) er á seðlinum. Hetta avmyndar motiv úr Kirkjubøarstólunum.
- Erskrift (mikroskrift) er á tølunum á seðlinum.
- Litingin er somikið tjúkk, at hendan kann kennast við fingrunum.
- Rútatráðurin til høgru á seðlinum skiftir lit, tá hann verður hildin móti ljósinum.

# Útgávukonsert við Páll Finnur Páll

**Páll Finnur Páll fara at bjóða tónleikatystum føroyingum fantastisk løg, tá teir spæla útgávukonsert fyri meistaraverkinum "Førist"**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




Í sambandi við, at Páll Finnur Páll góvu fløguna "Førist" út herfyri, verður nú fríggjakvøldið skipað fyri útgávukonsert á REX, har høvi verður at hoyra m.o. løgini um teir á herberginum, kannibalin inni hjá grannanum, um at sova hjá Kaj og sangin til George Harrison.

Páll Finnur Páll høvdu eina av teimum bestu framførslunum á føroyska tónleikapallinum í summar, tá teir spældu á G!, og hetta sigur ikki so lítið, eitt summar har kremið av føroyskum tónleikí, og útlendsk heimsnøvn fyltu okkum við stórupplivingum. Serliga eru tað tey frálíku løgini, sum bera bólkin bæði á palli og fløgu. Fløgan "Førist" er eitt meistaraverk, Hon er á tremur við fantastiskum løgum,.sum fara at eiga eitt stórt pláss í føroyskari mentanarsøgu.

Tað eru SMS og REX, ið skipa fyri konsertini, tískil er ókeypis atgongd fyri allar limir í SMS-liðnum, ið hava fylt 18 ár. Tey, ið ikki eru limir, sleppa eisini inn, men skulu rinda atgongumerki.

Tiltakið byrjar kl. 22, tá verður bjóða ókeypis øl, sodavatn og ábit. Kl. 23 fara Páll Finnur Páll á pallin.

Atgongumerkið til konsertina verður sent við einum sms-boði á fartelefonina hjá limum í SMS-liðnum hósdagin 15. september. Týdningarmikið er at goyma sms-boðið, ið skal vísast við dyrnar.

Hetta er fyrsta tiltakið av hesum slag, sum SMS bjóðar limum í SMS-liðnum, men ætlanin er at skipa fyri tiltøkum av ymiskum slag komandi tíðina. Um man ikki er limur áðrenn hósdagin, so ber til at tekna seg sum lim við dyrnar og sleppa inn til tiltakið ókeypis.

Rex letur upp sum vanligt á miðnátt, Tað kostar tá kr.100,- fyri alla náttini. Páll Finnur Páll fara aftur á pallin seinni, og restina av náttini er 80'ára disco við DJ Ottar í Funningsstovu.